Óli Gordon Beck, umboðsmaður skrivar:


Setið turbinuna har vatnið er!

— og flytið ikki vatnið, har turbinan er



orða-skifti um orku

Sosialurin heitti á meg um at vera við í einum orðaskifti um orkumál. Hjá okkum er orka gjørd til eitt fløkt mál. Tá menn skriva um orku, sær tað út, sum tað er nakað, ið hesir skrivandi eru í ferð við at uppfinna, nakað teir eru einsamallir um ella er teirra egna verk. Tá soleiðis verður ført fram í skriving og talu, so er einki at siga til, at vanlig fólk hava torført við at skilja ella ikki hætta sæ rundir at seta seg inn í tað, men siga so: Hasir eru jú verkfrøðingar ella politikkarar, teir mugu jú vita tað. Men er tað nú so, vita hesir menn alt? Gamal maður segði einaferð, at um ein maður veit alt, tá er hann vandamaður, og man tað helst vera so.



Kortið vísir Fuglafjørð. Omanfyri bygdina er avfallsøkið teknað upp og somuleiðis vatnleiðing

við nógvar áir í framtíðini. Ikki er langt av leið at hugsa sær smærri elverk sett út til tær størru árinar — eitt ella tvey um árið, soleiðis at tey sum frá leið, stóran part av árinum kundu nøktað størri og størri part av samlaða orkutørvinum.

Soleiðis kunnu vit við langtíðarplanlegging gera framtíðarvánirnar fyri okkum og komandi ættarlið munandi ljósari. Eitt vita vit, at oljan bert røkkur eini 70 ár aftrat, um vit ikki longu nú fara at drýggja hana. Alternativu orkukeldurnar: aldur, vindur og vatn, vit vit, geva ikki javna orkutilgongd, men við teimum møguleikum, vit kenna í dag, letur tað seg longu nú gera at seta bæði vatn, vind og alduverk upp, sum beinanvegin minka um oljunýtsluna, og so er megin til hesi verkini, tá ið tey eru bygd, økeypis og viðvarandi.

Vatnið í Suðuroy

Í 1921 tendraðu menn ljós suðuri í Vági. Tá var einki orkuráð, men tað var av vatninum í oynni, teir fingu ljós. Í 1927 tendraðu tvørámenn ljós frá sama verki, men vatnmegin, ið nýtt varð, var bert ein lítil partur av tí, ið varð og framvegis er av vatni í oynni.

Tað er meir enn nóg mikið av vatni í oynni, bæði til hita, ljós og idnað, hví brúka menn ikki vatnið, tað kostar jú einki. Setið turbinuna, har vatnið er, so fáa vit streym fyri 21 oyru kw. í staðin fyri sum nú 93 oyru í dag. Nógvar milliónir kundu verið spardar í Suðuroy, um teir nýttu vatnið, og teir fingu sjálvir ágóðan av tí sparda. Hvat høvdu teir, sum bygdu vatnverkið í Botni sagt í dag um skilið hjá SEV har í oynni, og at loyvi verður givið til framhaldandi skilaleysa uppseting av motorum, meðan okkara egna føroyska rávøra rennur í havið, og vit øll verða noydd at gjalda fyri tað. Hví lata kommununar har seg tøla á slíkan hátt, at alt ræðið verður av teimum tikið og lagt í hendurnar á óviðkomandi.

Norðoyggjar og Eysturoyggin

Í Norðoyggjum er almikið av vatni eisini. Teir hava fingið tilboð úr Noregi um vatnverk. Hvør forðar teimum í at fara til verka! Í navninum av demokratinum er alt vald lagt í hendurnar á SEV og onkrum nevndum, sum nakrir menn seta hvønn annan í. Síðan skriva teir hvørjum øðrum brøv, sum teir sjálvir viðgera.

Í kaldbaksfirði rennur so nógv vatn, at um tað varð nýtt til orku, áðrenn tað fór í havið, kundu vit árliga fingið um 25 milj. kwt. Alt kann fáast skjótt og bíligt, ja so bíligt, at tað verður tagt burtur bæði av politikarum og teimum kønu, sum vita um hetta, tí SEV hevur ikki ráð til, at prísirnir fara niður. Í Eysturoynni — í Fuglafirði og á Eiði, kunnu turbinur setast fyri heilt lítlan pening, uttan at nakar hevur fyri neyðini at gremja seg um, at tað skemmir náttúruna.

Longu undir kríngum hevði ein maður í Leynum, Jógvan Egholm, gjørt sær eitt vatnverk í eini lítlari á, og hagani hevði hann nóg mikið av streymi til ljós til hús sítt í nógv ár. Tað einasta hetta kostaði var uppsetingin. Framleiðslan var økeypis, so sigast kann, at afturgongdin í Føroyum er stór í dag.

Tettið lekarnar

Tað má verða gjørligt at tætta lekarnar á núverandi vatnbyrgingum og gjørt eitt sindur við sjálvi vatnverkini. Tá kundu vit nøkta helmingin av tørvinum av streyminum vit vatni, og gjørdu vit smá vatnverk í Kaldbak, Klaksvík, Suðuroy og Fuglafirði, vórðu vit sjálvbjargnir við el. Á fleiri av teimum smærru oyggjunum kunnu vatnverk gerast. Alt hetta kann gerast uttan eitt einasta berghol ella paraply, eingir uppturkaðir skráningar og vatnið rennur í havið — men áðrenn hevur tað givið okkum orku.

Eitt dømi um hetta er, at millum bergholini í Norðoyggjum kunnu tvær turbinur nýta sama vatnið uttan at skaða nakran við vatnveiting. Í Norðoyggjum annars er einki til hindurs fyri at útvega einar 25 milj. kwt. árliga við at seta turbinurnar, har vatnið er.

Tá mugu ikki vera Højgaard og Schultz A/S, ið fylgdir verða, tá tað umræður orku í Føroyum. Vit hava ikki ráð til sovorðið. Um politikararnir hava lisið byggiætlanina frá Højgaard & Schultz frá 2. mai 1979 uppá 116 síður, tá mugu teir skilja, at tað kann ikki vera Føroyar, ið Højgaard og Schultz A/S hava ætlað at bygt út við vatnmegi. Eitt er púra vist! Okkara løgtingsmenn eiga at seta seg inn í, hvat tað er SEV og Højgaard & Schultz ætla at gera.

Politikararnir — orkuráð

Tað má haldast at vera heilt burturvið, tá vit hugsa um, at kommununar eru tiknar so heilt av ræði, eisini um, hvat tær skulu nýta vatnið til, ið tær fáa fyri einki. Hvør hevur so skyldina í øllum hesum! Illa ber til at geva øðrum enn okkum sjálvum hana. Vit velja 32 løgtingsmenn. Teir geva so myndugleikan úr tinginum til 5—6 landsstýrismenn, sum fáa heimildir til næstan, hvat sum helst frá løgtinginum, og av hesum 5—6 landsstýrismonnunum eru fyri tað mesta bert 2/3 valdir av fólkinum. Hesir seta so nevndir og ráð av øllum sløgum, eisini orkuráð.

Áðrenn Orkuráðið varð valt í síni tíð, kom orkan til landið við smáum tangaskipum. Broyting er eingin hend, uttan at tangaskipini sigla oftari nú, tí motorarnir eru fleiri nú, meðan okkara orka, ið einki kostar, framvegis rennur ótarnað í havið, og arbeiðsmenn, fiskimenn og øll hini verða pínd við útreiðslum fyri olju.

Ídnaðurin og framleiðslan í Føroyum kosta 4 ferðir so nógv sum í øðrum londum, meðan hesin hurlivasin av nevndum og ráðum, sett av teimum, vit velja 4. hvørt ár, ferðast uttan- sum innanlands uppá landsins besta. Fleiri politikarar eru komnir til ta niðurstøðu, at orkumálið í Føroyum er vorðið eitt vandamál, ja teir siga, at allur heimurin er í vanda fyri orku. Hví lata teir so okkara orku renna í havið? Hvat var tann verunliga ætlanin við Orkuráðnum? Var tað valt, fyri at einki skuldi henda á økinum vatnorka?

Norskt tilboð

Í summar var norskt felag: Trygve Elind A/S í Føroyum. Teir byggja smá vatnverk. Saman við SEV var ætlanin at vísa á, hvussu vit her kundu útbyggja okkara vatnorku á ein skjótan og bíligan hátt. Øll vita vit, hvussu leiðslan og stýrið í SEV tók ímóti teimum, so vit lata tað liggja nú. Men sjónligt var, at SEV hugaði ikki tað, ið hesir menn høvdu at føra fram. Ein av orsøkunum kann vera, at teir vóru ikki nóg dýrir.

Tað norska felagið, ið Eilif Samuelsen, landsstýrismaður vísir á í grein síni í Sosialinum leygardagin 7. november eitur »Bærdalen«. Hetta felagið einsog Højgaard og Schultz A/S arbeiðir við so stórum eindum, at okkara smáu viðurskifti hvørva í myndini. Okkara figgjarmegi á hesum øki má ikki yvirmetast. Tí eru tað smáar eindir av vatnverkum, vit hava fyri neyðini, vatnverk, ið standa, har vatnið er, og har tey passa seg sjálv. Vit mugu minnast til, at vatnverkini halda í 45 ár, meðan dýr motorverk bert halda í 15 ár.

Hvør hevur ræðið

Ein kundi spurt, hví kommununar ikki sjálvar byggja síni kraftverk. Hví verður ræði ðtikið frá teimum á hesum økinum eisini og lagt í hendurnar á tilvildarligum persónum. Í útvarpinum nú eitt kvøldið varð Jógvan Sundstein, løgtingsformaður spurdur um orkumálið, ið nú skuldi til tjak í tinginum, og svaraði hann, at løgtingið fór ikki at taka nakra støðu í málinum. Hvør skal taka støðu í einum slíkum máli, sum kemur at kosta samfelagnum einar 1200 milj. kr., um SEV fær sín vilja, uttan løgtingið, tá ræðið jú er tikið frá kommununum.

Ju, løgtingið má taka støðu og lata ræðið aftur til kommununar, so tær sjálvar gera av, hvat og hvør skal útvega teimum ta orku, sum er grundstuðulin undir allari framleiðslu. Tað kann ikki vera líka mikið, hvat orkan kostar. Tað kann ikki vera líka mikið, um ein familja nýtir 5.000 kr. ella 20.000 kr. til ljós og hita, ella eitt flakavirki ella snikkara-

Framhald á síðu 12